## Stjól sigarettir

Herverk varð framt á fýra bátar um vikuskiftið á Skálatrøð og í Vágsbotni. Tá fólk fara oman at pumpa bát, so síggja tey, at onkur hevði gjørt seg inn á bátarnar. Løgreglan kannar málið.

Leygarkvøldið stjól ein maður í Havn tveir pakkar av sigarettum, men hann varð tikin av løgregluni løtu seinni.

-hkm

## 130 vórðu steðgaðir

Mánadagin steðgaði løgreglan 130 bilum, sum koyrdu forbí Hvalvíkina. 11 frágreiðingar vórðu skrivaðar fyri trygdarbelti, ljós, niðurslitin dekk, og píkadekk.

Á Langasandi vórðu 22 bilar steðgaðir og tvær frágreiðingar skrivaðar. Og eitt ferðsluóhapp var í Eysturoynni um vikuskiftið, men ongin persónsskaði.

-hkm

## Pápin koyrdi hann heim

Nøkur full fólk hava verið á løgreglustøðini í Havn og sovið sær rúsin av um tað langa vikuskiftið. Umframt tað lá ein persónur avdottin í Leirvík, men hann svav ikki á løgreglustøðini, tí pápi hansara koyrdi hann heim.

Ein persónur varð tikin fyri rúsdrekkakoyring í Klaksvík um vikuskiftið. Persónurin rendi á, og tá løgreglan kom á staðið, varð hann kannaður fyri rúsdrekka. Tá vísti tað seg, at promillan var hægri enn hon átti at verða.

-hkm

# Ólavsøkan 2004 í Keypmannahavn við at fáa luft undir veingirnir

TÍÐINDASKRIV



Sum tað sær út nú, er eingin ivi um, at tað stóra takið at fáa ólavsøkutiltøkini klár gongur eftir ætlan. Arbeiðið við ólavsøkuni 2004 í Keypmannahavn 28.- og 29. juli er við at vera komið upp undir land. Bólkurin, sum arbeiðir við tiltakinum, er eftir góðar og lívligar samrøður, nú komin ásamt um eina fyribils skrá fyri ólavsøkuaftan og ólavsøkudag. Ein skrá við bæði ítróttarligum og mentanarligum tiltøkum. Eitt sindur av skemti og gaman verður sjálvandi eisini stundir til.

### Stutt úr skránni

Úr skránni kann stutt nevnast: Kappróður millum ymsar føroyskar bátar, mannaðir við fólki frá feløgunum í Danmark, millum annað Róðrarfelagnum Neystinum í Ishøj Havn, Knørri í Hvidovre og Tvørábátinum og øðrum. Áðrenn kappróðurin byrjar, koma bátarnir, fleiri seks- og tíggjumannafør, rógvandi frá Nyhavn tvørtur um havnina til Norðbryggjuna, har teir verða móttiknir av ymsum heiðursgestum. Tryggvi Johansen, stjóri á Føroysku Sendistovuni, hevur játtað at halda setanarrøðuna.

Eftir kappróðurin verður føroyskur dansur uttandura á Bryggjuni. Samband er við ymiskar føroyskar bólkar og einstaklingar. Ætlanin er eisini, at spælimenn skula ganga runt og seta sín dám á millum róðrarnar. Ymist undirhald verður í hylinum framman fyri Bryggjuna. Fleiri tiltøk vera eisini fyri børnini. Ólavsøkuaftanskvøld verður dansur live á 5. hædd, fýrverkarí og midnáttarsangur. Sjálvandi verður eisini ólavsøkuguðstænasta ólavsøkudag og ein stór, sera áhugaverd konsert við ymiskum, vældámdum føroyskum tónleikarum sum Hanus Johansen, Sámal Ravnsfjall, Stanley Samuelsen og Týr. Jú, sanniliga verður nakað at gleða seg til tann 28.- og 29. juli í Keypmannahavnar Kanalum

### Farið er undir at finna stuðlar

Arbeiðsbólkurin er farin í gongd við bæði myndugleikar og privatar fyritøkur fyri at fáa stuðul til tiltakið. Í skrivandi stund hava vit longu fingið skrivliga játtan um stuðul frá Atlantic Airways. Vit hava samband við fleiri aðrar. Tað sær út til, at tær fyritøkur vit hava samband við, vísa okkum stóra vælvild til at stuðla einum tiltakið, sum á ein positivan hátt er við til at seta Føroyar í fokus og vaksa um kunnleikan um Føroyar og føroyingar og tað, sum teir umboða í Danmark.

### Gott íkast til býarlívið

Tey fyrstu tíðindabrøvini vórðu send út fyri einum mánað síðani og hava verið í ymsum bløðum her í Danmark og í Føroyum. Vit í arbeiðsbólkinum hava góðar vónir um ólavsøkutiltøkini. Vit síggja eisini vælvild hjá øllum áhugabólkunum, sum við hesum hava høvi til at vera við til at gera Keypmannahavn til ein uppaftur áhugaverdari og stuttligari bý hjá íbúgvunum og teimum túsundtals ferðandi, sum vitja býin. Soleiðis at øll kunna uppliva nakað, sum er øðrvísi, nevniliga Ólavsøkuna 2004 í Keypmannahavn.

# 200 musikkskúlanæmingar missa undirvísing

**Føroya Musikkskúlalærarafelag heitir inniliga á politikararnar um at hækka játtanina til Musikkskúlan. Við játtanini sum er, verða 4,5 lærarastørv spard burtur**

SKERJINGAR
*Tíðindaskriv*

Í yvirlýsing ger Føroya Musikkskúlalærarafelag greitt, at játtaða upphædding til Musikkskúlan fer at raka umleið 200 næmingar, tí 4,5 lærarastørv skulu sparast burtur. Felagið vil tí hava løgtingið at koma við eini eykajáttan á ólavsøku. Yvirlýsingin er soljóðandi:

»Í sáttmálanum millum Fíggjarmálarráðið og Føroya Musikklærarafelag eru ásettar lønarhækkingar, eins og í øðrum sáttmálum.

Tíverri endurspeglar løgtingsfíggjarlógin fyri 2004 ikki hesar lønarhækkingar og musikkskúlaskipanin er tí noydd at repa seglini.

Føroya Musikklærarafelag vil við hesari yvirlýsing gera vart við, at avleiðingarnar fyri musikkskúlavirksemi kring landið eru sera álvarsamar.

Sambært musikkskúlaleiðaranum verður skúlin noyddur at skera 4,5 fulltíðarstørv burtur. Hetta rakar hópin av næmingum. Umleið 200 næmingar, ið hava fingið tónleikafrálæru í styttri ella longri tíðarskeið, noyðast at fáa tey tungu boð, at tónleikafrálæra teirra er skorin burtur.

Musikklærarar standa spyrjandi. Vit hava veruliga haft ta fatan, at politikkarar vilja hava ein vælvirkandi musikkskúla um alt landið. Her er neyðugt at vísa á, at ein ikki fær ein vælvirkandi skúla við námsfrøðiliga nøktandi frálæru, tá ið skúlin veksur nógv í uppgangstíðum, fyri síðani at tveita alt fyri borð, tá ið strammar at fíggjarliga.

Vit ynskja heldur eina støðuga og ábyrgdarfulla menning av skúlanum, og ein slíkan vøkstur, at skerjingar ikki gerast neyðugar í verri tíðum.

Høvuðstankin við musikkskúlalógini er, at Føroya Musikkskúli skal vera eitt tilboð til alt føroya fólk.

Um ikki landspolitikkarar og embætisfólk vísa ábyrgd fyri Føroya Musikkskúla, er stórur vandi fyri at høvuðsendamálið við skúlanum dettur fyri bakka.

Sum sagt, hava vit ta fatan at politikkarar úr øllum flokkum, vilja Føroya Musikkskúla væl. Okkara áheitan er tí á Løgtingið um at koma við einari eykajáttan á ólavsøku, so uppsagnir ikki gerast neyðugar, og allir næmingar kunnu halda fram komandi skúlaár.«

# Nýggjur formaður í Ráfiskakeyparafelagnum



Føroya Ráfiskakeyparafelag hevur havt aðalfund, har øll nevndin var afturvald. Eftir fundin skipaði nevndin seg við Egil Olsen sum nýggjum formanni.

Føroya Ráfiskakeyparafelag hevði aðalfund fríggjadagin 28. mai í Vinnuhúsinum.

Í farna ári hevur felagið verið myndað av nevnd við Páll Gregersen sum formanni, Meinhard Jacobsen, sum næstformanni og nevndarlimunum Petur H. Mohr, Egil Olsen og Egil Johansen.

Á aðalfundinum var nevndin afturvald, og eftir fundin skipaði nevndin seg við Egil Olsen sum nýggjum formanni, meðan Meinhard Jacobsen heldur á fram sum næstformaður.

Á fundinum var staðfest at støðan hjá virkjunum er vánalig. Orsøkin er fyrst og fremst øktar útreiðslur hjá virkjunum orsakað av stóra lønarvøkstrinum seinastu árini.

Á fundinum var einaferð enn staðfest, at nevndin hevur fullan stuðul frá limunum at skipa eina nýggja uppboðssølu. Virkini síggja hetta sum eina loysn, sum kann loysa partar av óskipaðu viðurskiftinum rundan um keyp og sølu, og harundir tryggja at føroysk virki fáa veruligan møguleika at bjóða upp á allan føroyska fiskin.



# Gávan verður nýtt til eitt klaver

**Ólavur Hátun sigur, at Heiðursgáva Landsins fyrst og fremst verður brúkt til eitt nýtt klaver. Hann sigur seg vera ovfarnan av heiðursgávuni frá landsstýrismanninum í mentamálum**

HEIÐURSGÁVA LANDSINS
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Mynd: Ólavur Hátún sigur, at Heiðursgáva Landsins verður brúkt til eitt nýtt klaver*

*Mynd: Savnsmynd*

– Eg fari at keypa mær eitt nýtt klaver fyri pengarnar. Eg og konan hava hús bæði í Havn og í Bø, men eg havi einki ljóðføri í Bø, og tí ætli eg mær at keypa eitt klaver fyri pengarnar. Um nýggja klaverið verður í Bø ella eg flyti klaverið í Havn til Bíggjar, veit eg ikki eg rættiliga enn.

Ólavur Hátun er rættiliga avgjørdur, tá vit spyrja hann um, hvat peningaupphæddin fyri Heiðursgávu Landsins skal nýtast til. Fyrrapartin týsdagin fekk hann 75.000 krónur fyri Heiðursgávu Landsins 2004.

### Ómetaliga glaður

– Ovfarin, glaður ein sannur heiður. Soleiðis lýsir Ólavur Hátun kenslurnar, tá hann leygardagin fekk boðini frá soninum,Heina, um, at hann hevur fingið Heiðursgávu Landsins 2004.

Heiðursgávan verður latin einstaklingi, felagi ella fyritøku, sum tøkk og viðurkenning fyri at hava framt avrik, ið hava ella havt serstakan stóran týdning fyri føroyska list og/ella føroyska mentan og mentanarlív.

Tað er landsstýrismanninum í mentamálum, ið letur Heiðursgávu Landsins.

Ein nevnd umboðandi føroysk listafólk og Mentamálaráðið gav tilmælið til landsstýrismannin um at lata Heiðursgávuna í ár til Ólav Hátun fyri sitt lívstrev í føroyskum kórsangi og kórvirksemi at fram.

Í grundgevingunum verður róð fram undir stóra arbeiðið, ið Ólavur hevur gjørt fyri føroyskan kórsang. Hann verður lýstur sum ein sannur slóðbrótari og íbirtari, sum áhaldandi hevur lagt lunnar undir føroysku sangmentanina.

Nevndin sigur eisini, at hansara umfatandi kórvirksemi seinastu mongu árini hevur givið føroyskum kórsangarum fjøltáttaðar og mennandi uppgávur, og samstundis bjóðað áhoyrarum í Føroyum varandi mentanarligar upplivingar á høgum stigi.

### Í Noregi

Tá vit fingu orðið á Ólav fyrrapartin týsdagin, gjørdu hann og konan seg til reiðar at fara úr Noregi til Danmarkar í summarhús. Yngsti sonurin hjá Ólavi og Ásu, Hjalmar, hevur júst lokið P.H.D-prógv í oceanologi á lærda háskúlanum í Bergen, og foreldrini vóru við til verjuna av uppgávuni í farnu viku.

# Hanus Kamban og Ólavur Hátún heiðraðir

**Hanus Kamban fær Mentanarvirðisløn Landsins og Ólavur Hátún fær Heiðursgávu Landsins**

MENTAN
*Tíðindaskriv*



*Hanus Kamban fær Mentanarvirðisløn Landsins fyri skaldskap og fjøltáttaða bókmentavirksemi hansara*

Mentanarvirðisløn Landsins verður í ár latin Hanusi Kamban, rithøvundi. Tað er landsstýrismaðurin í mentamálum, ið letur Mentanarvirðislønina eftir tilmæli frá nevnd umboðandi føroysk listafólk og Mentamálaráðið. Virðislønin er kr. 150.000 og er hin størsta av sínum slag í Føroyum.

Mentanarvirðisløn Landsins verður latin føroyskum listafólki sum tøkk fyri útint listaligt avrik innan skaldskap, myndlist, leiklist, tónlist ella aðra list. Til tess at fáa Mentanarvirðislønina skal virðislønarevnið hava skapað listaligt verk á høgum listaligum stigi, ið ger, at virðislønarevnið má haldast at hava uppiborið henda heiður. Seinast var tað Gunnar Hoydal, rithøvundur, ið varð heiðraður við Mentanarvirðisløn Landsins.

Nevndin sigur í grundgeving síni: "Mentanarvirðisløn Landsins verður latin Hanusi Kamban fyri skaldskap og fjøltáttaða bókmentavirksemi hansara. Eyðkent fyri skaldskap Hanusar serstakliga í stuttsøgunum er ivin, tað ótrygga - døpurhugin - ofta í tilveruskiftunum millum barnaár, unglingaár og vaksnamannaár. Frígeringin frá teimum, ið natúrliga hava rátt, er sum pílagrímsferð, har menniskjan stríðist og leitar eftir sær sjálvari - onnur skulu ikki avgera, hvussu tú skalt liva, men tú sjálvur. Bókmentaliga ævisøgan um J. H. O. Djurhuus er megnarverk, ið hevjar seg upp í føroyskum bókmentum sum sjáldsamur dýrgripur. Umframt at hava latið heimsbókmentir í føroyskan búna, hevur Hanus Kamban skrivað ótal av greinum um samfelags- og politisk viðurskifti, og hevur við innliti sínum í fremmandan skaldskap verið føroyska skaldaheiminum dyggur í kjaki bókmentaliga, listaliga og mentanarliga."

Umframt Mentanarvirðisløn Landsins letur landsstýrismaðurin í mentamálum eisini Heiðursgávu Landsins, ið er kr. 75.000. Sama nevnd ger tilmæli til landsstýrismannin, og verður Heiðursgáva Landsins í ár latin Ólavi Hátún.

Heiðursgáva Landsins verður latin einstaklingi, felagi ella fyritøku sum tøkk og viðurkenning fyri at hava framt avrik, ið hava ella hava havt serstakan stóran týdning fyri føroyska list og/ella føroyska mentan og mentanarlív. Seinast var tað Axel Tórgarð, sum fekk henda heiður.

Nevndin sigur í grundgeving síni: "Heiðursgáva Landsins verður latin Ólavi Hátún fyri lívsstrev hansara føroyskum kórsangi og kórvirksemi at frama. Ólavur hevur verið slóðbrótari og íbirtari, og hevur áhaldandi lagt lunnar undir føroysku sangmentanina. Hann stovnaði Útvarpskórið, ið seinni varð til Havnarkórið, var stovnari av Kórsambandi Føroya og hevur staðið á odda fyri stóru kórstevnunum. Á ólavsøku hevur hann staðið í fremstu røð við brennandi hjarta fyri fólkamentanini og nátúrligum sangi, sum er ogn Føroya fólks. Á mongu konsertferðunum hevur hann breitt føroyskan kórsang, tónleik og skaldskap út um lond. Ólavur Hátún hevur somuleiðis stjórnað og skipað fyri fleiri altjóða kórverkum, og hevur við hesum givið føroyskum kórsangarum fjøltáttaðar og mennandi avbjóðingar, og samstundis bjóðað áhoyrarum í Føroyum varandi mentanarligar upplivingar á høgum stigi."

Mentanarvirðisløn Landsins og Heiðursgáva Landsins verða handaðar við við alment hátíðarhald seinni í ár.

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3784
**Navn:** Sp/f Bedingin
**Adressa:** 800 Tvøroyri

**Kommuna:** Tvøroyrar Kommuna
**Stovningardato:** 12.05.2004
**Viðtøkudato:** 12.05.2004
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnarar:** Sp/f Bærendsen Teknik, 800 Tvøroyri (Sp/f 2503) og Knútur Nygaard, 826 Trongisvágur.
**Nevnd:** Bergur Bærendsen, 827 Øravíkarlíð (formaður) og Knútur Nygaard, 826 Trongisvágur.
**Stjórn:** Knútur Nygaard, 826 Trongisvágur.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóranum og nevndarformanninum í felag ella av allari nevndini í felag.
**Grannskoðari:** Sp/f ADS-grannskoðan, 826 Trongisvágur.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 12.05.2004 - 31.12.2004
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka smiðju- og bedingsvirksemi og annað yrki í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya*
*tann 27. mei 2004*
*Kristin Balle*